VINNU SÍÐURNAR
VINNA HANDVERK HANDIL

Nr. 209 • týsdagur • 1. november 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Krúnborg fer ongan veg

**Petur Jacobsen, reiðari, avsannar blankt leysasøgurnar um útlendska kappbjóðan upp á Krúnborg. Hetta hóast leysasøgurnar áhaldandi tosa um ørandi milliónaupphæddir**

KRÚNBORG
*Jákup Mørk*

Leysasøgurnar um eina møguliga sølu av Krúnborg hava verið alsamt títtari og harðmæltari seinastu tíðina. Frá fleiri keldum hevur ljóðað, at norsk, íslendsk og kinesisk handilskartel eru til reiðar at leggja mest sum ørandi upphæddir á borðið, fyri at fáa fatur á krúndiamantinum í Eileri Jacobsen og synunum. Men sjálvir siga eigararnir, at hesar søgur eru tiknar úr leysum lofti.

- Tað hava sjálvandi verið fyrispurningar av og á, men ítøkiligа eru eingi boð komin, sigur Petur Jacobsen, sum er annar av stjórunum í P/F Krúnborg.

- Vit hava í øllum førum ikki sjálvir nakran áhuga í at selja. Vit høvdu eitt keðiligt bein, sum nú er sagað burtur, og tað virksemi, sum nú er í felagnum, er avgjørt ikki nakað, sum vit vilja sleppa okkum av við. Vit eru jú ikki meira enn 30-40 ára gamlir, so ein søla er á ongan hátt tað, sum stendur fremst í huganum, staðfestir hann við tilvísing til Sólborg, sum ikki longur er í felagnum.

Men eru søgurnar sannar, eru fleiri hundrað milliónir, sum tit kunnu skora, um tit selja. Er ein søla ikki lokkandi, um talan verður um slíkar upphæddir?

- Sjálvandi hevur alt sín prís. Stóð onkur í túninum hjá mær og beyð fimm milliónir fyri húsini, so hevði eg heilt víst selt, men tað boðið havi eg so ikki fingið enn, hálvgum flennir hann.



*Tað ljóðar áhaldandi, at kinverskir ríkmenn standa til reiðar við hundraðtals milliónum fyri at fáa hendur á Krúnborg – og kvotunum í hesum. Møsn siga reiðararnir, sum als ikki vilja kennast við hetta*
Mynd: Reuters ±

## Gull vert

Hóast avsannina av søguni, so er einki løgið í, um útlendskir íleggjarar hava sýnt Krúnborg stóran áhuga.

Verður sæð burtur frá árinum í fjør, har Sólborg í stóran mun ávirkaði rakstrurin negativt, so er talan á pappírinum um eina sera sunna og sterka fyritøku.

Higartil hevur felagið so ikki havt nakrar trupulleikar yvirhøvur, tá stóra skuldin í Krúnborg skal forrentast, og við metlágu rentuni, sum er galdandi í fíggjarheiminum í dag, kunnu tær 15 milliónirnar, sum ársúrslitið hevur ligið um, forrentað heilt stórar keypsupphæddir.

Enn hava handlar av hesum slag ikki verið gjøgnumførdir í Føroyum seinastu tíðina. Men verður hugt at eitt nú handlunum við Vesturvón og JFK, so er einki at ivast í, at handilsvirði á nótakvotunum hjá Krúnborg liggur á teirri heilt stuttligu síðuni av teimum hundrað milliónunum. Og sambært teimum tølum, sum vórðu nevnd frá íslendskum keldum ta ferðina, so verður fremsta talið kanska ikki nakað eitt-tal.

## FAKTA

### P/F Krúnborg

| tkr. | 2004 | 2003 | 2002 | 2001 |
|---|---|---|---|---|
| Bruttovinningur | 24.440 | 42.807 | 56.282 | 48.956 |
| Ársúrslit | -1.642 | 12.806 | 20.009 | 16.112 |
| Ogn íalt | 167.981 | 152.662 | 149.521 | 130.140 |
| Eginpeningur | 80.991 | 82.633 | 69.827 | 49.817 |
| Eginpeningsavkast | -3 | 18 | 36 | 39 |
| Ognaravkast | 1 | 12 | 20 | 19 |
| Soliditetur | 48 | 54 | 47 | 38 |

### Ognarviðurskifti

P/F Ísborg eigur allan partapeningin í P/F Krúnborg
Høvuðspartaeigarar í P/F Ísborg eru Eiler Jacobsen, Sámal Jacobsen, Petur Jacobsen og Eiler Jacobsen (yngri).

## Klaksvíkingar hava einki hoyrt

Tá tosað verður um Krúnborg, er helst nærliggjandi hjá teimum flestu at hugsa, at somu viðurskifti eru galdandi hjá Christian í Grótinum.

Men í Klaksvík tykjast menn hava bestan hug at yppa øksl, tá spurningurin verður settur.

- Vit hava hoyrt hasara søgurnar um Krúnborg, men okkara fatan er púrasta greitt, at talan helst er um leysasøgur uttan hald í veruleikanum, sigur Eyðun Rasmussen at skrivstovuni hjá Christian í Grótinum.

Hava tit sjálvir merkt nakað til útlendskan áhuga fyri tykkara reiðaríði.

- Als ikki. Vit hava eina fyritøku, sum vit royna at reka sum best, og tað er sum so tað, ljóðar staðfestingin av skrivstovuni.

**-mørk**

## Lýsingar geva meirsølu

**Ein norsk kanning vísir, at íløgur í marknaðarføring kunnu koma fleirfalt aftur.**

LÝSINGAR
*www.industry.fo*

Marknaðarføring er ein íløga, ikki ein kostnaður, og størri íløgan er, størri er avkastið, sum fæst av íløguni sigur marknaðarstjórin í "Eksportutvalget for fisk". Væl at merkja um íløgurnar í marknaðarføring verða gjørdar á rættan hátt

Niðurstøðan hjá "Eksportutvalget for fisk" er gjørd út frá einari frágreiðing, sum hevur hugt at ymiskum marknaðum og um tað loysir seg at brúka pening uppá marknaðarføring. Kanningin vísir at í Týsklandi gevur 1 kr. í marknaðarføring 4,9 kr. í meirsølu. Í Japan gevur 1 kr. í marknaðarføring 3,3 kr. og í Frankaríki 2,8 kr. í meirsølu.

*(kelda: intrafish)*